**Almanna- og heilsumálaráðið**

# Avloysari fyri deildarleiðara í Almanna- og heisumálaráðnum

Eitt starv sum avloysari fyri deildarleiðara á Tænastueindini í Almanna- og heilsumálaráðnum verður við hesum lýst leyst til setan í tíðarskeiðnum 1. september 2005 -1. apríl 2006 ella eftir nærri avtalu.

Talan er um leiðarastarv fyri stápseind við beinleiðis tilvísing til aðalstjóran.

**Høvuðsuppgávur:**
Deildarleiðarin hevur yvirskipaðu ábyrgdina av:

- Umsitingini av húsinum, harundir innanhýsis broytingar og uttanhýsis viðlíkahald.
- Móttøkuni/vekslaranum.
- Journal/Post.
- Bóka- og lógarsavninum.
- Samskiftinum úteftir við Løgtingið, Løgmansskrivstovuna og Innlendismálaráðið, tá talan er um lógir og kunngerðir.
- Aðrar fyri starvið viðkomandi uppgávur.

**Fyrimun hevur umsøkjari sum hevur:**
Skrivstovuútbúgving, vitan um almenna fyrisiting.
Kunnleika til arbeiði við lógar- og kunngerðararbeiði.
Kunnleika til journalisering og Doculive journalskipan.
Kunnleika til EDV.

**Løn og setanartreytir:**
Setanarøkið er Almanna- og heisumálaráðið við tilhoyrandi stovnum umframt Løgmansskrivstovan og hini stjórnarráðini.
Lønar- og setanartreytir verða samsvarandi sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.
Starvið er flokkað í lønarflokki VI.
Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Hansu Sørensen, deildarleiðara, tlf. 30 40 50. ella teldupost ahr@ahr.fo

**Umsóknir:**
Umsókn við avriti av prógvum, C.V. o.ø. skulu sendast til:
Almanna- og heilsumálaráðið
att. Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2
FO-100 Tórshavn

**Umsóknarfreist:** 5. august 2005, kl. 12:00.




## Broytingar í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu

Sambært gr. 6 í løgtingslóg nr. 13 frá 21.mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir verður við hesum gjørt kunnugt, at Tórshavnar býráð á fundi 23. juni 2005 samtykti broytingar í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Ætlaða broytingin er, at ein partur av C2-økinum (opin miðstaðarbygging) á Hálsi, verður broytt til D2, ítróttarøki.

Broytingin umfatar partar av matr. nr. 1393, 1395, 1396, 1397, 1408a, 1409 og 1410d, Tórshavn og litra ec og ei, Tórshavn.

Tilfar, sum lýsir broytingina liggur frammi í Snarskivuni á Vaglinum, frá 4. juli til og við 22. juli 2005, frá mánadegi til fríggjadag frá kl. 9.00 til kl. 16.00, hósdag tó til kl. 18.00.

Møgulig mótmæli ella broytingaruppskot verða at senda Tórshavnar kommunu skrivliga í seinasta lagi 4. oktober 2005.




## Kringvarp Føroya søkir lærlingar til sjónvarpið

Søkt verur eftir tveimum lærlingum til útbúgvingina sum miðlatøknimekanikarar at byrja 1. september.

Læran umfatar alt tekniskt arbeiði innan sjónvarp, m.a. upptøkur, redigering og viðlíkahald av útgerð.

Útbúgvingin tekur 4½ ár. Av hesum eru 55 vikur skúlagongd í Danmark.

**Førleikakrøv:**

- "Grundforløbet teknologi og kommunikation inden for den kreative mediefamilie", á góðkendum skúla, ella
- HH-, HF- ella studentsprógv.

Royndir við og áhugi fyri sjónvarpsmiðlinum er ein fyrimunir.

Umsóknir við viðmælum og prógvum skulu sendast til:

Kringvarp Føroya
Norðara Ringvegi
Postboks 1299
110 Tórshavn
Merkt: MTM-lærlingar

Nærri upplýsingar kunnu fáast við venda sær til J.Herluf Sørensen, tel 347742, t-post: jhs@svf.fo.

Umsóknir skulu vera kringvarpinum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 15. juli 2005, kl. 13.00. Umsøkjarar mugu vera tøkir til praktiska roynd leygardagin tann 23. juli.

**Kringvarp Føroya**

LEIGA AMBOÐ & MASKINUR

Kaj Andreasen & Co
BREKKUTÚN 7 · 188 HOYVÍK
TEL 31 56 00



www. Sosialurin .fo